GJALDSTOVAN

# Ársfundur hjá Landsneti 2024

Til ársfundin hjá Landsneti á Hotel Hilton 31. mai vóru møtt gott 80 fólk umboðandi bæði ráð, stovnar og kommunusamstørv.

Durita Hansen bjóðaði vælkomin og greiddi frá praktiskum viðurskiftum. Hon vísti á, at skráin fyri ein stóran part var um vitlíki. Hon gav síðan orðið til Ruth Vang, landsstýriskvinnu í Fíggjarmálum.

## Ruth Vang setti ársfundin

Ruth Vang takkaði fyri høvið at seta fundin. Hon tosaði um, hvussu stóran týdning Landsnet hevur, tí Landsnet veitir eina góða og trygga KT-tænastu til almennu Føroyar. Eitt meginmál í Landsneti er KT-trygd, og her økjast krøvini støðugt.

Av tí at KT er ein so stórur partur av arbeiðinum í fyrisitingini, er eisini umráðandi at hava eina trygga skjalagoymslu. Skjalhald er slóðbrótandi, millum annað, tí Skjalhald er føroyska við góðari hjálp frá journalførarum í miðfyrisitingini.

Ruth Vang segði, at politiskt skulu vit tryggja, at almenni geirin er klárur at brúka vitlíki á ein hátt, sum er í tráð við okkara virðir og tekur atlit til borgarar og dátuvernd. Vitlíki hevur stórar møguleikar, men tað hevur eisini við sær ábyrgd, sum vit mugu taka í størsta álvara.

## Formansfrágreiðingin hjá Bergi Hansen

Bergur Hansen bar fram formansfrágreiðingina og umrøddi nøkur av evnunum frá fundunum farna árið.

Ein broyting er gjørd í brúkararáðnum, so tað bara verður valt annaðhvørt ár heldur enn hvørt ár. Hetta er fyri at gera arbeiðið meira støðugt. Brúkararáðið í Landsneti er ikki fevnt av javnstøðulógini, men tó eggjaði Bergur aðalráðunum til at hava javnstøðu í huga, næstu ferð umboð til brúkararáðið standa fyri vali.

Ein broyting er gjørd í brúkararáðnum, so tað bara verður valt annaðhvørt ár heldur enn hvørt ár.

Hann vísti á týdningin av at vera ein partur av Landsneti, og hvussu tað kann gera arbeiðið léttari hjá einum stovni sum Landsverki (LV). Sum dømi nevndi Bergur: NaaS - Network as a Service, sum er ein tænasta til at reka og viðlíkahalda netið hjá stovninum. Harumframt er rammusáttmálin til keyp av teldum ein fyrimunur fyri LV. Um ein telda er í ólagi, so fara tey inn á heimasíðuna hjá KT húsinum, rita inn og síggja,

hvørjar teldur eru tøkar. Teldan verður keypt og og aloftast latin sama dag, KT húsið setur telduna til á LV, og brúkarin fær næstan alt lagt inn beinanvegin og kann arbeiða aftur eftir hálvum degi. Fyrr kundi ganga fleiri dagar, áðrenn ein nýggj telda var klár.

Bergur vísti á Teamsbólkin fyri úrvalsbrúkarar. Um onkur ikki er í honum, so kunnu tey seta seg í samband við KTL fyri at koma í bólkin.

Brúkararáðið fer at skipa fyri verkstovum fyri úrvalsbrúkarum í ár. Tað vera færri evnir enn seinast, so fólk kunnu arbeiða meira við tí evni, sum tey hava valt.

## Birgir av Steinum, deildarstjóri á KTL

Birgir av Steinum, deildarstjóri á KTL fekk síðan orðið. Hann segði, at tað er stutt síðan at seinasti fundur var, men í starvsskipanini stendur, at fundurin skal haldast um várið, og hann hevur vanliga verið hildin um hesa tíðina. Í fjør bar tað ikki til, og tí varð fundurin hildin í fjør heyst.

Birgir greiddi frá, hví vitlíki var sett á skrá í ár. Vitlíki verður alt meira aktuelt, og um vit ikki byrja at seta vitlíki á skrá, so kunnu vit blíva afturúrsigld, tí vit ikki duga at fáa ágóðan av tí. Tað er av týdningi, at tað er skil á, tí vit hava sæð dømi, har vitlíki verður misnýtt. Í ES hevur verið arbeitt við eini AI reglugerð, sum júst er sett í gildið. Talan verður um eina stigvísa verkseting komandi árini, har endamálið er at regulera brúkið av vitlíki. Í Føroyum er einki sett á skrá formliga, og tað kann gerast ein avbjóðing, um vit ikki hava týðiligar leiðreglur fyri, hvussu vitlíkið kann verða brúkt. Tøknin bíðar ikki eftir okkum, og vitlíki fer at ávirka allar geirar, og tað krevur ábyrgd og etikk.

Á Gjaldstovuni verður arbeitt við at gera øll starvsfólk tilvitað um vitlíkið, og trygdarfólkini á stovninum arbeiða saman við AI serfrøðingunum á Gjaldstovuni við leiðreglum, sum stovnar og brúkarar skulu taka støðu til, tá ið farið verður undir at brúka vitlíkið í arbeiðinum.

Sagt verður, at tá ein fyritøka letur tær okkurt ókeypis, so er tað tú, sum er handilsvøran. Hetta er eisini galdandi fyri vitlíkið. Tí eru eini góð ráð ikki at brúka ókeypis útgávurnar, tá ið tú brúkar vitlíkið í samband við arbeiðið.

Fyri at fáa betri innlit í vitlíki, hava vit fingið tveir persónar at umrøða evnið, ein frá einum brúkara-sjónarmiði og ein sum fer at umrøða samfelagsligu og etisku atlitini, ið vit skulu taka til nýggju tøknina.

Hvat er hent síðan seinast ? Millum annað hevur KTL undirskrivað sáttmálar við Elektron og Formula fyri eitt tíðarskeið áljóðandi 4 ár. Nógvir stovnar eru komnir á Network as a Service, sum lættir um umsitingina

og økir um trygdina. Nýtslan av Windows Autopilot hevur stytt munandi um tíðina, tað tekur at útflýggja eina teldu, og sparir okkum tíð.

Skjalhald bjóðar nú eitt fundarmodul, sum gevur øðrum atgongd til skjøl í Skjalhaldi umvegis Teams, og eitt innlitsmodul, sum ger tað lættari at geva innlit í innlitsmál. Síðan seinast eru Umhvørvisstovan og Heilsufrøðiliga starvsstovan komin á Skjalhald. Umframt hetta hevur KTL sett sær sum mál at knýta Skjalhald saman við Power BI. Forkanningin til arbeiðið byrjar eftir summarfrítíðina. Ætlanin fyri Skjalhald er at fáa hagtøl yvir í Power BI, víðka knýtið til Vangan og fáa Virkið knýtt í Skjalhald, tá ið tað er sett í verk.

Viðvíkjandi Nettrygd, sum eisini er ein partur av Nettrygdarætlanini, so verður arbeitt við at fáa eitt Security Operations Center. Hetta fer at hava við sær yvirvaking av skipanum 24/7/365, so at tey, ið halda eyga við, um nakað óregluligt fer fram, eisini kunnu støðga álopum. Somuleiðis fer arbeiðið við at deila netið sundur eisini í gongd seinni í heyst.

Á seinasta fundi varð nevnt, at vit skulu lúka 20 minstukrøvini, sum Digtaliseringsstyrelsen og Center for Cybersikkerhed hava sett donskum myndugleikum. Í ár eru krøvini 29 í tali. Hesi 29 minstukrøvini hava vit sjálvboðin sett okkum fyri at halda. Bæði tí vit halda, at tað er skilagott, og tí tað hækkar trygdina. Tit hava nógv samstørv við danskar myndugleikar, og tí er tað ein fyrimunur, at tit kunnu vísa á, at vit lúka krøvini.

Vit lúka longu flestu krøvini. Av teimum sum vit ikki lúka í verandi løtu, eru nøkur krøv, ið eru einføld at loysa, meðan onnur ikki eru so einføld og onnur kosta nógv. Eisini eru krøv, sum tænasturnar í Landsneti lúka, men fakskipanirnar gera ikki.

Eftir umfatandi samráðingar við Elektron og Formula hevur KTL skrivað undir sáttmálar við báðar veitararnar 4 ár afturat. Úrslitið gjørdist, at báðir sáttmálarnir gjørdust bíligari, hetta uttan at tænastustigið lækkaði. Vit fingu lægri prís á m.a. diskum og trygdaravritum umframt aðrar sparingar.

Tað skulu gerast íløgur fyri at halda ásett trygdarkrøv, stovna eitt Security Operation Center, gera eitt betri sundurbýti av netinum, at fáa helpdesk skipanirnar at tosa betri saman, so boð og støður verða dagførdar so hvørt millum skipanirnar hjá okkum og veitarunum.

Birgir gjøgnumgekk árið 2023 og greiddi frá útlitinum fyri 2024. Talan varð um eina príshækking uppá 10% fyri Landsnet og fyri Skjalhald frá primo 2024. Nýggju sáttmálarnir hava eisini viðført sparingar, og á Skjalhaldi hava vit fingið fleiri kundar.

Samanumtikið síggja fíggjarætlanirnar fyri Skjalhald og Landsnet betri út í ár, tí inntøkurnar hækka og útreiðslurnar lækka. Tað fer at kosta nógv at seta eitt Security Operations Center í verk, at lúka tey 29

minstukrøvini og býta netið sundur. Nú eru tað helst fleiri, sum hugsa um eina príslækking, og okkurt kemur, men í 2025 skal lisens avtalan við Microsoft endurnýggjast. Tá ið NIS2 krøvini eru sett í verk í Føroyum, so fara tey eisini at kosta. Tí er tað er ov tíðliga at tosa um eina príslækking nú, men tað er nakað, sum vit javnan meta um, so vit bæði kunnu veita eitt høgt tænastustig, sum eisini er bíligt.

Ymsir spurningar vóru eisini:

- Hvat kostar Copilot? - 2.500 kr. pr. brúkara um árið við bindingstíð í 1 ár.
- Hvør er veitari av SOC? - Tað er ikki avgjørt enn.
- Kunnu ”gamlar teldur” fáa forritini lagt inn av nýggjum eins og nýggjar teldur? - Ja, tað ber til.
- Ber til at gera lættari brúkarar, enn ‘lættur brúkari’ í dag? - KTL fer at tosa við Microsoft um tað í heyst í sambandi við samráðingar um lisensavtaluna
- Er Skjalhald knýtt í FOLK? - Ja, FOLK er Landsfólkayvirlitið, og Skjalhald er knýtt í Landsfólkayvirlitið
- Verða framløgurnar tøkar seinri? - Ja, tit fáa atgongd til alt.

## Tóri Slættalíð

Tóri Slættalíð, frá Framskák, hevði framløgu, sum hevði yvirskriftina ´Arbeið snildari við vitlíki´. Hann greiddi frá nýtsluni av vitlíki í Føroyum, og hvussu vit kunnu brúka tøknina í okkara arbeiði. Somuleiðis greiddi hann frá, hvussu vitlíki virkar.

Hann vísti á, at vit skulu ikki verða bangin fyri vitlíki, men vit mugu skilja hvussu tað arbeiðir. Millum annað tí at tað ikki arbeiðir við ”fakta”, men við sannlíkindum. Hann vísti eitt dømi, har hann bað Vitlíki gera eina mynd av eini familju, har øll vístu mittasta fingurin. Tað segði vitlíki nei til at gera. So bað Tóri um tað sama, men at fólkini skuldi vísa 3. fingurin fram. Tá riggaði. Hetta vísir, hvussu vitlíki arbeiðir. Síðan vísti hann, hvussu til ber at fáa ein samandrátt av einum føroyskum teksti. Av tí at teksturin er á føroyskum, kann hann eisini spyrja á føroyskum.

Spurningur: Kann ChatGPT gera myndir? Til hetta svaraði Tóri ja, tað kann hann.

## Mikkel Flyverbom

Mikkel Flyverbom er professari i samskifti og talgildum broytingum á Copenhagen Buisness School, formaður í serfrøðingabólkinum um tøknirisar hjá donsku stjórnini og limur í Dataetisk Råd og í Rådet for Digital Sikkerhed.

'Hvad skal vi gøre med kunstig intelligens' var yvirskriftin hjá Mikkel Flyverbom. Hann tosaði um tær stóru broytingarnar, sum hava verið við talgilding. Vísti á, at tað er nógv, sum vit kunnu gera við vitlíki. Vit kunnu standardisera og automatisera ávísar arbeiðsgongdir. Sortera og finna mynstur í stórum dátamongdum, tí tað kann halda greiði á størri dátamongdum enn fólk megna. Fara at fáa fleiri sjálvkoyrandi loysnir í framtíðini og tí kunna brúka tilfeingi øðrvísi. So nógvir fyrimunir eru eisini við vitlíki.

Vit mugu vera varin, tí við generativum intelligensi, so kann vitlíki skeikla trúvirðið og álitið okkara millum. Tað verður torført at síggja, um ting eru verulig ella gjørd við vitlíki, sokallað Deepfake. Hann vísti á, at vit skulu taka etisk og samfelagslig atlit, so vit tryggja, at fólkavaldið ikki endar í hondunum á tøknirisunum.

Mikkel Flyverbom segði, at tað er ikki fyrr enn tey seinastu árini, at danskir politikkarar hava gjørt nakað við avbjóðingarnar við vitlíki. Somuleiðis kom hann inn á AI regluverkið. Hann vísti á, at tað er av týdningi at vitlíki er á tí politisku dagsskránni, tí tað er eisini samfelagsábyrgd. Tað er ikki nokk, bara at hava tað á einum einstaklinga plani.

Hann vísti á 5 boð:

- At tøkniliga menningin er ábyrgdin hjá leiðslu og politikarum.
- Vitlíki og talgilding verða koyrd av handilsligum og politiskum kreftum - ikki neyðturviliga eitt, ið passar saman við egin áhugamál.
- Skil millum gott og vánaligt brúk at vitlíki. Leggja dent á kjarnuuppgávuna.
- Talgildar broytingar skulu gerast innanífrá og niðri frá - í praksis.
- Minst til, at ikki alt skal talgildast ella loysast við tøkni.

Hvat skulu Føroyar gera við vitlíki? Mikkel Flyverbom helt, at vit skulu samanbera okkum við onnur, fyri at síggja, hvat tey hava gjørt og læra av teimum. Tað hevur nógv at siga, hvussu skjótt, og hvar man ætlar sær.

Mikkel Flyverbom vísti á, at um fólk ikki sjálvi taka støðu til vitlíki, so má man kanska góðkenna, at onnur geva tær boð um, hvat/hvussu tú skal gera. M.a. skúlar, hvørjar uppgávur liggja hjá teimum viðvíkjandi læring av vitlíki.

Leif Abrahamsen takkaði Mikkel Flyverbom fyri framløguna. Og síðan tók hann samanum. Hann greiddi frá, at á Gjaldstovuni eru vit í holt við at kunna starvsfólkini hjá okkum um vitlíki. Gjaldstovan hevur mánaðarliga kunnandi fund um AI við onkrum ávísum evni, har øll kunnu verða við. Vit hava bæði innanhýsis fólk og fólk uttanífrá at kunna um vitlíki. Hetta stigið hava vit tikið, so starvsfólkini verða kunnaði um vitlíki og síggja møguleikarnar við tí í teirra arbeiði.